# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Tað er ov vandamikið fyri hinar hermenninar at senda son verjumálaráðharrans til Afghanistan*

*(norski verjuovastin)*

# Brown og Bush tosa um Darfur og handil

**Gordon Brown er farin á sína fyrstu uttanlandsferð sum stjórnarleiðari, og sum væntað lá leiðin vestur um hav**



*Bush og Brown í einum av golfvognunum í Camp David*

Hóast hann neyvan verður líka lættur at dansa við sum undanmaðurin, fekk Gordon Brown eina hjartaliga móttøku, tá hann í gjárkvøldið kom til frítíðarbústaðin hjá amerikanska forsetanum í Camp David í statinum Maryland, og eins og Tony Blair og so mangir ríkis- og stjórnarleiðarar fekk Brown ein túr í einum av golfvognunum hjá Bysh, forseta.

Undan frágerðini úr London í gjár segði talsmaðurin hjá Brown, at forsætisráðharrin ætlar sær at taka tvey evni upp á fundinum við George W. Bush í dag. Tað fyrra er, hvussu altjóða samfelagið kann fáa gongd á royndirnar at fáa frið í sudanska landspartinum Darfur, og tað seinna evnið er, hvussu tað slepst burtur úr naggatódnini í fríhandilssamráðingunum í WTO.

Amerikanska umsitingin hevði onga viðmerking til vitjanina ella samrøðuevnini í gjárkvøldið, men eygleiðarar søgdu, at tað er eingin ivi um, at teir báðir eisini fara at umrøða støðuna í Irak. Á tí økinum hevur Brown ikki havt somu sjónarmið sum undanmaðurin, Tony Blair, sum vanliga hevði somu hugsanir sum Bush, skrivar Reuters.

# Tapti men vil ikki frá

**Flokkurin hjá japanska forsætisráðharranum tapti valið í gjár, men forsætisráðharrin vil ikki frá**

- Eg havi gjørt av at halda tey lyfti, sum eg havi givið, sjálvt um støðan er álvarssom, segði tann 52 ára gamli Shinzo Abe, tá tað var vorðið greitt, at flokkur hansara hevði tapt tjóðartingsvalið í gjár.

Shinzo Abe er formaður í Liberala Demokratiska Flokkinum, sum hevur stýrt Japan at kalla uttan slit síðani 1955. Á valinum í gjár misti flokkurin meirilutan í yvirhúsinum í tjóðartinginum, men flokkurin hevur tó framvegis meiriluta í tí máttmikla undirhúsinum og kann tí verða sitandi. Hóast hann sýtir fyri at fara frá, viðgekk Shinzo Abe í gjárkvøldið, at tað var hansara skyld, at LPD hevði tapt valið.

Sigursharrin á valinum í gjár var Demokratiski Flokkurin, sum nakrir sosialistar og fyrrverandi tingmenn hjá LPD stovnaðu í 1998.



*Japanski forsætisráðharrin harmaðist valúrslitið, men hann fer ikki frá*

## Grøvin hjá Dánjali profeti oyðiløgd

Eitt av teimum nógvu søguligu støðunum í Irak, grøvin hjá profetinum Dánjali, varð oyðilagt í einari spreinging í gjár. Irakska løgreglan sigur, at uppreistrarmenn sprongdu grøvina í luftina. Grøvin hjá Dánjali profeti var í landspartinum Al-Wajihiya einar 60 kilometrar í landnyrðing úr Bagdad.

## STUTT SAGT

### USA elvir til lógloysi

USA og serstakliga núverandi amerikanska stjórnin gera sær dælt av landsins hernaðarligu megi á ein slíkan hátt, at tess framferð kann ikki kallast annað enn lógloysi og eggjar øðrum til tað sama. Hendan hvassa atfinningin kom frá fyrrverandi sovjetska forsetanum Mikhail Gorbatjov á einum tíðindafundi í Moskva um vikuskiftið. Hann segði, at amerikanska stjórnin sær USA sum heimsins einasta stórveldi, og at stjórnin tískil heldur seg kunna gera, sum henni lystir. Ein avleiðing er millum annað, at USA hevur onga virðing fyri ST, segði Gorbatjov.

### Sonurin fer ikki avstað

Í Noregi hevur tann ovasta leiðslan í herinum gjørt av, at hermaðurin Joachim Strøm-Erichsen skal ikki til Afghanistan at gera tænastu saman við hinum norsku hermonnunum har. Orsøkin er, at Joachim er sonur norska verjumálaráðharran, Anne-Grete Strøm-Erichsen. Herleiðslan sigur, at tað kann vera serliga vandamikið fyri norsku herdeildina í Afghanistan, um fíggindin fær at vita, at sonur verjumálaráðharrans er í deildini, og tí fer Joachim Strøm-Erichsen ikki til Afghanistan.

### Hermaður sovnaði

Ein ísraelskur hermaður sovnaði undir einum álopi í Gaza-geiranum leygarkvøldið. Tá felagar hansara komu aftur til leguna, varnaðust teir, at ein av hermonnunum var ikki komin aftur, og teir fóru tí at leita eftir honum. Tað vísti seg, at hann lá í fasta svøvni 700 metrar frá stikinum, sum er millum Ísrael og Gaza-geiran.